# TILTØK

SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

**Gudstænastur Hósdagin 3. mai**
***Sambýlið í Bøgøtu:*** kl. 19.30, Magnus Brahé Jørgensen

**Dýrabiðidag:**
***Havnar kirkja:*** kl. 11 Sonja Klein, altargangur, skriftamál kl 10,40
***Vesturkirkjan:*** kl. 11, konfirmatión, Heri Joensen
***Bøur:*** kl. 11 David Johannesen
***Vestmanna:*** kl 11 – Inga Poulsen Dam
***Kollafjørður:*** kl. 11, konfirmatión, Marjun Bæk
***Søldarfjørður:*** kl. 11, Meinhard Bjartalíð
***Leirvík:*** kl. 11, Uni Næs Í Fuglafjarðar prestagjaldi gongur talvan fyri Guðs orðs boðan ***Broytt kirkjutíð: Frá Dýra Biðidegi verður farið í kirkju í Leirvík kl. 11.***
***Sjóvar kirkja:*** kl. 11, altarg., Jógvan Fríðriksson.
***Oyndarfjørður:*** kl. 18 Jógvan Fríðriksson.
***Broytt kirkjutíð: Í Selatraðar og Sjóvar kirkju er gudstænastan um summarið kl. 11***
***Eiði:*** kl. 11 (sunnudagsskúlin luttekur) Emil Olsen. Broytt kirkjutíð. ***Frá dýra biðidegi verður farið í kirkju kl. 11 á Eiði og við Norðskála.***
***Norðskála:*** kl. 11 messa við forbønartænastu Sverri Steinhólm og Øssur Kjølbrø.
***Fríðrikskirkjan:*** kl. 11, Martin R. Jaconsen
***Hattarvík:*** kl. 12, Elsa Funding
***Christianskirkjan:*** kl. 11. Magnus Brahé Jørgensen.
***Christianskirkjan. Liturgisk messa:*** Dýra biðidag 4. mai kl. 16 verður ein Liturgisk messa eftir Petur Martin Johannesen framførd her í kirkjuni. Kórið í Friðrikskirkjuni fer at syngja saman við sangarum úr Klaksvík. Liturgur verður Meinhard Bjartalíð.
***Sandur:*** kl. 12, altarg., Jákup R. Hansen
***Fámjin:*** kl. 12 Jónsvein Bech.

**4. sunnudag eftir páskir**
***Havnar kirkja:*** kl. 11, Jógvan Fríðriksson
***Nólsoy:*** kl. 12 Sonja Klein, konfirmation
***Vesturkirkjan:*** kl. 11, altarg., Heri Joensen
***Miðvágur:*** kl. 11, David Johannesen
***Kvívík:*** kl. 12, konfirmatión, Marjun Bæk
***Kollafjørður:*** kl 11, altarg., – Inga Poulsen Dam
***Norðskála:*** kl. 10.40 skriftamál, kl. 11 messa Emil Olsen. ***Broytt kirkjutíð. Frá komandi sunnudegi verður farið í kirkju kl. 11 á Eiði og við Norðskála.***
***Gøta:*** kl. 11, Martin R. Jacobsen
***Rituvík:*** kl. 11, Meinhard Bjartalíð, altargangur.
***Hellurnar:*** kl. 11, altarg., Uni Næs
***Kunoy:*** kl. 12. Magnus Brahé Jørgensen
***Kirkja:*** kl. 12, Elsa Funding. ***Á Viðareiði verður kirkjutíðin nú broytt til kl. 11. Fyrstu ferð Dýra biðidag.***
***Skúvoy:*** kl. 12, altarg., Jákup R. Hansen.
***Tvøroyri:*** kl. 14 familju- og barnagudstænasta, barnagospelkórið hjá Mirka syngur. Aftaná verður drekkamuður í missiónshúsinum.

**Havnar kirkja**
Aftankvirra í Havnar kirkju Dýra biðidag 4. mai kl. 21–23. Kl. 22 spælir blásaratrioin Atlantsljómur. Kl. 22.30 hevur Sólrun Poulsen andakt.

**Fríkirkjan Oasan Kirkjustræti 4**
Hósdagin kl. 7 bøn, kl. 20 ungdómsmøti, fríggjadagin kl 7 bøn, sunnudagin kl 11 Guðstænasta v/Jóna Johannesen evni: Skapandi trúgv kl. 14 sunnudagsskúli, Mánakvøldið kl. 17.15- 18 venur barnakórið kl. 20 bønarmøti. Verið hjartaliga vælkomin. www.oasan.fo

**Filadelfia, Landavegur 22**
Leygardagin einki Flare vegna brúdleyp. Sunnudagin kl. 10.45 Møti, kl. 11.30 sunnudagsskúlin. www.filadelfia.fo

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Hósdag kl. 20 Heimaforbund fyri allar kvinnur. Sunnudag kl. 11 møti. Eingin sunnudagsskúli, men kl. 17 skipar hornorkestri fyri møti fyri alla familjuna, drekkamunnur aftaná, øll eru vælkomin. Sápa, suppa og frelsa síðan 1865. www.frelsunarherurin.fo

**Meinigheitshúsið í Havn**
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti v. Frits og Símun Petur Dýra biðidag kl. 18 Sang- og vitnimøti. Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Sunnudagin kl. 18 Møti v. Klæmint Tausen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10 barnabíbliutími og bíbliugransking. Kl. 11 gudstænasta, Odd Fuglestad.

**Ebenezer**
Hósdag kl 17 Sangvenjing, Barnakórið og Kassia, kl. 20 Ungdómsmøti Fríggjadag kl. 18 Møti. Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangeliskt møti. Mánadag kl. 12.30 Andakt Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Dýra biðidag kl. 21 ungdómsmøti. Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, Linda Petersen talar um breyðbróting, kl 18 evangeliskt møti við Rúnu & Hjalta. http://www.gospel.fo

**Hebron, Argir**
Sunnudagin 6. mai kl. 10.30: Morgunmøti og samstundis barnaansing. Kl. 11.30 Samvera við drekka. Kl. 12 Sunnudagsskúli og møti. Sørin Joensen, trúboðari í Teilandi, greiðir frá. Hjartaliga vælkomin í Hebron!

**Lívdin Í Hoyvíkar skúla**
Fríggjakvøldið kl. 21 ungdómsmøti har Dánjal Petersen talar. Sunnumorgunin kl. 10.30 Familjumøti. Kl. 11.30 Samfelagsløta. Kl. 12 Tilbiðjunarmøti har Jógvan Z. talar um Rómbrævið 8.26-27. Undir báðum møtinum er barnaansing fyri børn undir skúlaaldur. Kl. 12 Sunnudagsskúlin. Møtini kunna hoyrast beinleiðis á www.livdin.fo Týskvøldið kl. 20 Bøn og bønarskúli á Brekku 3. Vit bjóða øllum at vera vælkomin.

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Hósdag 3. mai kl. 20 Bíbliutími við Gunnar Reynslág (1. Kor. 8. kap). Vegna Ársmøtini hjá Heimamissiónini, so verður einki ungdómsmøti og møti.

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv.75*
Møti: Sunnudagin kl. 10.30 Breyðbróting. Kl.12 Sunnudagsskúli Sunnukvøldið kl 18.00 Evangeliskt møti Mánakvøldið kl 20.00 Bønar/uppbyggingarmøti.

**Missiónshúsið við Landavegin**
Dýra biðidag kl. 18 Møti. Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli á Norðasta Horni, kl. 18 Møti við Atla Rasmussen.

**KFUM og KFUK í Havn**
Hósdagin kl. 19.30 í KFUK: Hugnakvøld.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma, Yviri við Strond**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti. Øll eru vælkomin.

**Miðvágs Missiónshús**
Einki møti sunnukvøldið vegna ársmøti hjá Heimamissiónini í Nesvík.

**Filadelfia, Miðvágur**
Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti. Leygardagin kl. 16 bønarmøti. Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, Dánial á Dul Jacobsen talar.

**Kedron í Sørvági**
Sunnudagin 6.5. Breyðbróting við Læru kl: 11. Evangelisktmøtið kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.
**Børnini Møtast:**
Børnini møtast kl. 11 í kjallaranum í KEDRON, har øll børn eru hjartaliga vælkomin. Mikudagin 9.5.2007 kl. 20. Onki Bønarmøti vegna tað at húsbólkarnir samlast heima hjá teimum ymisku.

**Missiónshúsið í Sørvági**
Dýrabiðidagsstevna verður í Missiónshúsinum »Libanon« í Sørvági í døgunum 4.-6. juni 2007. Fríggjadagin 4. mai kl. 15: Stevnan verður sett á Pálsoyrini, við handilin Samkeyp. Marni av Kák og Harald Haraldsen seta stevnuna, Streingjakórið í Sørvági syngur. Um tað ikki viðrar, verður farið í Missiónshúsið. Kl. 19 Syngi við kvøld við ymiskum sangbólkum, duet og solosangi, harmonikuspælarar vera við. Leygardagin 5. mai kl. 10 Sangur og lovprísan og forbøntænasta. kl. 19 Møti í Missiónshúsinum, kl. 23 Ungdómur møtir ungdómi. Sunnudagin 6. mai kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 16 Møti í Missiónshúsinum, kl. 19.30 Møti í missiónshúsinum. Við kvøldmøtini verður innsavnan til missiónshúsið og arb. í Rumenien. Fríggja- og leygarkvøldið verður ein drekkamunnur eftr møtini. Sunnudagin millum møtini verður heitur rættur v.m. Vit bjóða øllum hjartaliga vælkomin til stevnuna, hvar boðskapurin um mannin frá Nasarett, Jesus Kristus, er í sentrum. Les www.123.hjemmeside.dk/jofri

**Saron, Flatnavegur 7, Vestmanna**
Sunnudagin 6/5, Evangeliskt vitni møti í Saron kl. 18. Týsdagin 8/5 Seniorløta í Saron klokkan 15-17.

**Ársmøti hjá Heimamissiónini í Nesvík**
Hósdagin 3. mai kl. 19.30 Sangmøti við vitnisburðum Sangur: Streingjakórið á Glyvrum, Magni Christiansen og Miktam. Innsavnan til Sjómansmissiónina. Kl. 21. Drekka, kl. 22. Vitniløta. Andakt: Bodil Jacobsen Sangur: Símun Olsen & CO
**Fríggjadagur 4 mai:**
Kl. 11 Gudstænasta við altargongd í Norðskála kirkju v/ Sverra Steinhólm Prædika: Øssur Kjølbro Innsetan og forbøn fyri Jóhannu Thomsen, Bjartur Johannesen og Øssur Kjølbro Innsavnan til útimissión, kl. 15 Pallborðsfundur við orðaskifti Evni: Samleikaskjalið – frælsi og bindingar Panel: Thomas Dam, Maja Jacobsen, Jan Johannesen og Jørmund Foldbo Orðaskifti 19.30 Møti. Evni: Syndin, sum skilir - náðin, sum sameinir. Tala: Niels Jacob Nielsen. Sangur: Streingjakórið úr Porkeri Innsavnan til Heimamissiónsungdóm kl. 21 Drekka, kl. 22 Vitniløta Andakt: Súsanna Kristiansen Sangur: Ungdómskórið úr Havn
**Leygardagur 5. mai:**
kl. 10 Frágreiðingar og viðgerð av staðbundnu arbeiðunum. Innlegg: John Petersen, Hanna Petersen og Kathrina Bærendsen kl. 14 Frágreiðing frá arbeiðinum. Formansfrágreiðing v/ Thomas Dam. Fíggjarfrágreiðing v/ Jørmund Foldbo. Heilsanir o.a. Orðaskifti um arbeiðið 19.30 Møti. Evni: Bíblian – Guðs heilaga orð Tala: Petur Martin Glerfoss Sangur: KFUM&K – kórið úr Klaksvík Tulkað verður fyri deyvum Innsavnan til Leguhúsið kl. 21 Drekka, kl. 22.30 Café við livandi tónleiki Andakt: Jørgin Jacobsen
**Sunnudagur 6. mai:**
11 Gudstænasta á vanligum støðum 15 Familjumøti. Strandingar framføra sangleik »Elia« Innsavnan til barnaarbeiðið 16.30 Drekka 18 Møti. Evni: Dópurin og frelsan Tala: Heri Tróndheim Sangur: Effata Endi: Thomas Dam, form. Innsavnan til Heimamissiónina. Drekka. Har afturat er serstøk skrá til børnini hvønn dag Øll hjartaliga vælkomin.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Dýribiðidagur 4. mai kl. 20 Ungdómsmøti/møti v/Susanne & Leif Madsen trúboðarapari í Kenja. Sunnudagur kl. 14 Sunnudagsskúlin avlýstur vegna familjumøti í Nesvík. Vit fara til Nesvíkar, bussur koyrir frá missiónshúsinum kl. 14. Kl. 18 møti v/Siggu Skorðadal. Mikudagur 9. mai kl. 20 bíbiltími. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Hósdagin kl.16 Bønarmøti. Sunnudagin kl. 18 Møti. Øll hjartaliga vælkomin

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldi kl. 21, Awake við ungdómi úr Getsemane. Sunnudagin kl. 17, Møti við Susan og Leif Madsen úr DK. Heidi Jacobsen syngur. Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna www.keldan.fo

**Kfum og Kfuk Klaksvík**
Dýrabiðidag kl. 18 Bønarmøti Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Kl.18 Konfirmantfest, øll eru vælkomin. Kl. 21 ungdómsmøti við »Ung av Skála«. Mánakvøldið kl. 20 møtist sjómanskvinnuringurin. Mikukvøldið kl. 20 Bibliutími við Pól Johannesen evni: 1,Tim. 4 www.kuff.fo

**Frá Soli Deo Gloria Klaksvík**
Hóskvøldið 3. mai kl. 20 ungdómsmøti. Sunnukvøldið 6. mai kl. 18 møti. Mánakvøldið 7. mai kl. 20 bønarmøti. Týskvøldið 8. mai kl. 20 møti við Susanne og Leif Madsen trúboðarar í Kenya.

**Getsemane, á Brekku 19 Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 er ungdómsmøti við Bárður á Lakjuni. Leygardagin kl. 10 er morgunbøn. Sunnudagin kl. 14 er møti, sunnudagsskúli er samstundis Hvønn gerandismorgun kl. 6:15 er morgunbøn.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Øll eru vælkomin.

**Tvøroyrar Missiónshús**
eingin Sunnudagsskúli, barnagudstænasta í kirkjuni Kl. 18 møti við Karl Kenning.

**Sangkvøld**
við Suðuroyarkórinum verður í VB húsinum Dýrabiðidag kl. 20. Øll eru vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Fríggjadag kl. 15 Sjónvarpsmøti. Møti fjølment! Leygardag kl. 15 Andakt á Tvøroyrar Ellisheimi. Kl. 16 Andakt í sambýlinum á Tvøroyri. Kl. 17 Um viðrar verður útimøti í miðbýnum á Tvøroyri. Sunnudag kl. 14 Sunnudagsskúli. Kl. 17.30: Bønarløta. Kl. 18 Vitni- og lovsongsmøti. »Kom við og prísa Harranum!« www.frelsunarherurin.fo

**Bethel, Vágur**
Dýrabiðidag onki møti vegna sangløtu við Suðuroyarkórinum í VB-húsinum kl. 20.

**Felagið Tórshavn, gongutúr**
Gongutúrur verður sunnudagin 6. mai 2007. Túrurin verður til Steinafjall við Velbastað. Byrjað verður við Velbastaðháls kl.15. Tilmelding á Kunningarstovuni.

**Sjómansheimið Ørkin Brautarholt 29, Reykjavík**
Hvønn sunnudag kl. 17 og fram til mai 2007 er møti á Ørkini.

**Heilafelagið**
Skrivstovan er opin hvønn mikudag frá kl. 19-20. *MBF-húsið kjallarin Inngongd frá Landavegnum Tlf. 321520.*

**Veit okkum eina hjálpandi hond**
at seta ein grønmetis ídnað á stovn, millum tey fátæku í Rumenien. **Ring 905699.** Kostnaðurin er kr. 100 + vanligt uppringingargjald. Kundar hjá Kall kunnu ringja. Takk fyri tína hjálpandi hond.
*Calarasi missiónin v/ Thomas J. Askham, Asbjørn Niclasen og Sverri Kjærbæk.*

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00
Teldup.: tilhald@torshavn.fo
***Hósdagin 3. mai***
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10-13 Máling og Tekning
kl. 14-17 Boccia í kjallaranum, Alma Poulsen
***Fríggjadagin 4. mai***
***Dýri biðidagur - stongt.***
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*